# Føroyavinur í Forsætisráðnum

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



**Lars Løkke Rasmussen man fara at roynast Føroyum hollur samstarvsfelagi, tí hann á meira enn ein hátt skilir føroyskt**

**»Góðandag!«**

Hesa púra vanligu føroysku heilsanina fært tú, tá tú á Christiansborg hittir og heilsar upp á mannin, sum í gjár gjørdist forsætisráðharri í Danmark.

Lars Løkke Rasmussen skilir tað, ið sagt verður, tá tú tosar føroyskt við hann. Eisini havi eg latið mær fortalt, at hann kann lokkast til at svara, bæði væl og virðiliga, á góðum føroyskum máli.

**Stórur fyrimunur fyri Føroyar**

Føroyar hoyra til arbeiðsøkið, ið ráðharrin sjálvur tekur sær av í Forsætismálaráðnum. Spurningurin er, um tað hevur nakran týdning, at nýggi forsætisráðharrin hevur gott innlit í føroysk viðurskifti.

Svarið er eitt greitt JA.

Sjálvsagt er tað ein stórur fyrimunur, at sitandi forsætisráðharrin hevur júst hetta innlit.

Allar samrøður og møguligar samráðingar, ið Lars Løkke Rasmussen skal hava við føroysk umboð, fara at standa í ljósinum av, at maðurin veit, hvat og hvussu Føroyar og føroyingar eru.

Sama grundleggjandi forstáilsi fyri føroyskum viðurskiftum kann forsætisráðharrin brúka, tá hann skal taka avgerðir, ið so ella so viðvíkja Føroyum.

Politisk mótstøðufólk her heima hava longu verið úti og manipulerað veruleikan við at siga, at kennskapur ráðharrans til Føroya ongan týdning hevur. Hetta er at tala móti betri vitandi.

**Dugnaligir politikarar**

Nýggi maðurin í Forsætismálaráðnum er nærlagdur, málrættaður og eisini treiskur, tá tað krevst. Hann hevur politiskt tev, dugur taktiska spælið og politiska handverkið.

Hóast Løkke í fjølmiðlum stundum er negativt umrøddur, so vita vit, ið á ymsan hátt hava samstarvað við hann, at veruleikin er ein annar.

Flestu ásanna, at undanmaðurin í Forsætismálaráðnum hevur roynst væl, og bert tíðin fer at vísa spurningurin um ikki læringurin - sum orðatakið sigur – fer at roynast betri enn lærumeistarin.

Og júst lærumeistarin, Anders Fogh Rasmussen, var ein sannur politiskur meistari bæði úti og heima. Tí kann tað ikki undra nakran, at júst Fogh nú er uppi á ovasta tindi í NATO.

Í Føroyum kunnu vit fegnast um, at eitt umboð fyri alt ríkið er sett í eitt so týðandi starv sum at vera aðalskrivari í NATO.

**Kontant svar í Fólkatinginum**

Í Føroyum fara fleiri at minnast Fogh sum hann, ið ruddaði upp, eftir at Poul Nyrup Rasmussen hevði megnað at fløkt viðurskiftini við Føroyar meira enn gott er.

Fogh er eisini forsætisráðharrin, ið effektivt sópaði Misskiltu Nationalistarnar í Tjóðveldi úr Fólkatingssalinum við retorikkinum um fullveldi.

Her gav Fogh teimum stutta svarið: Føroyar kunnu til eina og hvørja tíð brúka sín sjálvsavgerðarrætt, men avgerðina mugu føroyingar taka heima í Føroyum.

Á hesum øki skulu vit rokna við, at Lars Løkke Rasmussen fer at leggja seg á júst somu linju sum Fogh. Hetta er eisini tað einasta rætta.

**Bjóða manninum heim**

Lat okkum politikarar samstarva væl við nýggja forsætisráðharran. Gera vit tað, spyrjast góð úrslit burturúr fyri báðar partar.

Mítt uppskot er, at Landsstýrið skjótast møguligt bjóðar Lars Løkke Rasmussen, ið so ofta hevur verið her í privatum ørindum, heim til Føroya á vitjan, so vit kunnu byrja nýggja samstarvið væl.

# Steðgi ikki menningini í Føroyum

SÓLVIT NOLSØ



**Einki er betur fyri menningina í einum samfelag enn vitan. Tí er tað so umráðandi at menna vitan og styrkja grundarlagið undir henni**

Í mínum huga er lítið so umráðandi sum útbúgving. Útbúgving hækkar støði í einum samfelag. Útbúgving framleiðir vitan. Vitan eigur at verða ein grundarsteinur undir einum samfelag, tí vitan kann verða ein stór útflutningsvørða. Í Føroym eru granskingarmøguleikarnir nógvir. Fá lond liggja betur fyri enn Føroyar landafrøðiliga til gransking innan alt, sum hevur við sjógv og fisk at gera. Tað er einki uttan sjógvur rundanum, so tað eigur at verða upplagt, at kunna granska innan tað økið. Hvør kundi fingið ágóðan av granskanini? Møguleikarnir eru nógvir. Høvuðsvinnan, fiskivinnan, kundi fingið okkurt gott burturúr. Granskan innan streymviðurskiftir, ferðingarmynstur hjá fiskið, gróðri í sjónum, hita í sjónum o.s.fr., kundi gagnað okkara fiskivinnu ríkiliga.

Granskan innan tøkni kann eisini spæla ein stóran leiklut hjá høvuðsvinnuni. Góðar maskinur og rætta tøknin kann verða bæði tíðarsparandi og eisini ein sparing í krónum.

Granskan innan samfelagsfrøði kann hava jaliga ávirkan á fatanina av føroyska samfelagnum og øllum tí, ið rørist har inni í. Her kann kanna flytingarmynstur hjá fólkið, tíðarák, ungdómsmentan o.s.fr.

Granskan innan søgu kann hjálpa fólki, at skilja nútímans føroyska samfelagið. Við at skilja søguna kemur mann betur at skilja samtíðina.

Nú havi eg bert tikið nøkur heilt fá dømir, men væntandi skilja øll hvar eg fari við hesum. Uttan granskan steðgar menningin í samfelagnum. Tað er granskan, sum er drívmegin í fyri framburði. Ein eigur ikki at líta ov nógv á granskan uttanífrá, tí hon er ikki altíð passandi til føroysk viðurskiftir. At føroyska samfelagið er somikið frammaliga, sum tað er, er ein síður í sær sjálvum. Fá samfeløg, so lítil í støðd og fólkatalið eru so frammaliga sum Føroyar, so sanniliga er tað føroyska samfelagið einstakt. Tað líkist ikki nøkrum øðrum. At Føroyar hava sítt egna mál og sín egna samleika er ótrúligt. Hetta eigur at styrkjast og verða tryggja bestu livilíkindi. Men víðari menningin skal tryggjast og hon skal gerast uppá føroyskan máta og ikki uppá mátan hjá nøkrum øðrum. Tí má meirlutin av vitan í Føroym framleiðast í Føroyum og ikki innflytast í ov stóran mun.

Tað er eisini ein fíggjarligur vinningur at hava eitt høgt støði innan útbúgving og granskan. Ein uppgerð frá Higher Education Funding Council For England vísur, at seinastu sjey árðini hevur bretski staturin koyrt £600 milliónir í bretsk universitetir og henda íløgan hevur framleitt eitt stað millum £2.9 og £4.2 milliardir aftur í virði. Hetta er avleiðing av at hava vælútbúgvi fólk, sum sum hava tíðarhóskandi útbúgvingar og eru blivin stuðlaði í, at verða nýskapandi og framsíggin. So vitan framleiðir pening og vitan kann verða ein stór útflutningsvørða um hon verður ment.

Men hvar fæst vitan at grógva? Innan útbúgving sjálvandi. Útbúgving líka frá fyrsta flokki og upp til Fróðskaparsetrið er tað, sum mennir vitan og fatanina av samfelagnum. Tí er tað so umráðandi, at hetta fær bestu livilíkindi. Eg eri greiður yvir, at tíðirnar ikki eru góðar. Tað er ikki lætt at fáa roknistykkir at ganga upp og tí skal ein ikki bara koma við sløgum eftir politikkarunum. Trúgvi ikki at nakað annað starv er verri enn at verða politikkari í hesum døgum. Men peningur má til og tí er mín áheitan á politikkarar um at fáa eina framtíðarætlan viðvíkjandi Fróðskaparsetrinum. Tann ætlanin skal ikki verða partapolitisk, tí eingin flokkur eigur Setrið einsamallur. Mann skal miða eftir, at geva útbúgving so nógv sum gjørligt. Veit ikki hvussu stórur partur av BTÚ verður nýttur uppá útbúgving, men tað kundi verði áhugavert at vita.

# Bør korset i flaget flagres bort?

JØRN NIELSEN
Næstved

I påsken sættes der fra kirkelig side fokus på både korset og opstandelsen. Men korset fokuseres der på hele året, hver gang Dannebrog med det hvide kors vajer over landskabet. Kristian 5.'s kongekrone, som kan ses på Rosenborg Slot i København, bruges stadig, fx hos domstolene, som logo med et kors i toppen, der ifg. hofmarskallatet er et vidnesbyrd om statens og monarkens forhold til den kristne tro.

I Norge har der været røster fremme om, at tiden er inde til, at flagre bort korset i deres flag som et naturligt og tidssvarende ønske om bortskaffelse af alle religiøse symboler i det åbne rum. Samme agitation er heller ikke ukendt i Danmark, hvor der med mellemrum slås til lyd for et nyt, neutralt flag. Og så er der også hensynet til muslimerne og et fremtidens Europa, hvor måske ca. 70 mill. tyrkiske muslimer skal indgå i kontinentets store union.

Korset på den gamle kongekrone symboliserer ifg. museumsdirektør Niels-Knud Liebgott fra Rosenborg Slot, at Kristus hersker over verden »Nej«, siger muslimerne, »Allah er større!«

Under protest fra ikkekristne blev Kristusfiguren fra Jellingstenen (også populært kaldet »Danmarks dåbsattest«) indført som logo og nationalsymbol i de danske pas i 1997, altså igen et vidnesbyrd om vort tilhørsforhold til kristentroen og – om man vil - til påskens langfredagskors. Det gjorde et vist indtryk på en amerikansk skoleklasse, da jeg lod mit danske pas med dets kristne symbol »vandre« rundt blandt børnene, for i Amerika er kirke og stat adskilte størrelser, og selv et kors i en offentlig mindepark kan få den ateistiske flanke højlydt på banen.

Så hvor er vi på vej hen i Danmark? Hitler agiterede for et »judenfrei« samfund. Men styrer vi til gengæld mod et kristendomsfrit Danmark og Europa med konsekvent afskaffelse af alle ydre symboler, herunder korset i Dannebrog?

Nej, Dannebrog med det hvide kors vil formentlig vaje min levetid ud. Der skal bare helst ikke lægges op til nogen samtale om, hvad dette kors står for. I hvert fald ikke i det åbne rum selvom Han, som langfredag døde på et kors, gjorde det i fuld offentlighed og ikke i et lukket kirkerum.

Uanset hvad opinionen måtte mene, er den påske, som jeg selv forholder mig til, såre enkel og består kun af disse fire ord: Kristus døde for mig!